# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Ger pakistanska stjórnin ikki álvara av bardaganum ímóti yvirgangi, eru øll føgur orð um samstarv okkara til fánýtis*

*indiski forsætisráðharrin*



*Minst 25.000 fólk eru flýdd úr Key West undan Frey*
*Mynd: Polfoto*

## Tey flýggja undan Frey

**Túsundtals amerikanarar eru flýddir undan tropisku ódnini Frey, sum ætlandi ber við land við land í kvøld**

Frey hevur kravt minst trý mannalív, síðani ódnin byrjaði sum ein tropiskur stormur við vindi og gloprarregni í Dominikanska Lýðveldinumn seinasta fríggjadag. Í dag hevur Frey herjað Kuba, men teir amerikonsku veðurmenninir hava ávarað um, at Frey fer at menna seg í dag og verður til eina tropiska ódn, áðrenn hon ber við land í USA í kvøld.

Sambært Nationale Hurricane Center, sum heldur til í Miami, kemur Frey inn yvir land eystarlaga við Meksikanska Flógvan og í Florida. Tað hevur fingið myndugleikarnar í Florida at biðja fólk í Key West, sum er ytst í Florida, leita sær skjól inni á landi, og í gjár vóru túsundtals bilar á veg haðani.

Borgarstjórin í Key West, Morgan McPherson, sigur við CNN, at minst 25.000 fólk eru rýmd undan tí faboðaða ódnarveðrinum. Tað eru ikki bara fastbúgvandi, sum flýggja. Key West er væl umtókt frítíðarstað, og nógv ferðafólk hava eisini valt at taka til rýmingar, sigur CNN.

Veðurstovnurin í Florida sigur seg vænta gloprarregn við vatnflóð, og tað er eisini vandi fyri meldurhvirlum.

## Farleiðin norðan fyri Amerika opin

**Kanadiska stjórnin hevur lýst ta sonevndu Útnyrðingsleiðina sum opna farleið**

Avgerðin hjá kanadisku stjórnini merkir ikki, at eingin ísur er á leiðini, men at tað ber til at sleppa vesturum við at sigla ímillum ísfjøllini. Men avgerðin er eisini eitt tekin um, hvussu nógv og hvussu skjótt viðurskiftini norðan fyri kanadisku strendurnar broytast, skrivar AP.

Nakað av ísi er framvegis í tí eystara partinum av farleiðini, men har vesturi er so lítil ísur eftir, at sambært kanadisku myndugleikunum verður leiðin ísfrí innan ein mánað ella so. Kortini ávara myndugleikarnir um, at ísur kann brotna burtur av kantinum og reka útfrá, og tí skulu skip vísa størsta varsemi.

Áhugin fyri at brúka Útnyrðingsleiðina er stórur, og tað eru bæði handilsskip, ferðamannaskip og stuttleikaskip, sum vilja sleppa at royna leiðina. Teir kanadisku sjóferðslumyndugleikarnir siga, at í løtuni sigla umleið 50 skip í tí tí arktiska økinum, og tey flestu eru handilsskip.




*Kanada hevur lýst Útnyrðingsleiðina sum sum opna sjóleið*

*Mynd: KNR*

## Sjeyburar í Egyptalandi

Tann 72 ára gamla egyptiska kvinnan Ghazala Khamis hevur fingið sjeyburar. Hon fekk fýra dreingir og tvær gentur. Børnini vórðu tikin við keisaraskurði ein mánað fyri ta ásettu tíðina og hava verið í kuvøsu síðina. Frammanundan eiga Ghazala Khamis og maðurin tríggjar døtur. Tað er ikki á hvørjum degi, at sjeyburar koma í heimin, og í Egyptalandi hevur hendingin eisinin vakt ans. Eitt nú hevur stjórnin lovað mammuni mjólk og blæður til tey fimm børnini tey bæði næstu árini.

**STUTT SAGT**

### Loyniligt hátíðarhald

Tá Afghanistan fer at hátíðarhalda sín tjóðardag næstu ferð, verður tað almenna hátíðarhaldið á einum loyniligum staði. Tað hava myndugleikarnir avgjørt, skrivar AP.

Eygleiðarar ivast ikki í, at tað er óttin fyri álopi frá Taliban, sum hevur fingið stjórnina at dylja, hvar landsins leiðarar verða tjóðardagin. Eygleiðararnir vísa á, at undir einari hernaðarsýning í apríl royndi Taliban at beina fyri Hamid Karzai, forseta, sjálvt um trygdartiltøkini vóru sera umfatandi.

Afghonsku myndugleikarnir vilja ikki viðurkenna, at tað er av ótta fyri álopum frá Taliban, at tað almenna hátíðarhaldið verður á einum loyniligum staði. Talsmaðurin hjá verjumálaráðnum í Kabul sigur við tíðindastovurnar, at haldið verður loyniligt fyri ikki at órógva ferðsluna í høvuðsstaðnum.

Tey seinastu árini hevur tað almenna hátíðarhaldið á tjóðardegnum verið á einum ítróttarvølli nærhendis forsetaborgini í Kabul. Umframt landsins politisku og hernaðarligu leiðarar hava útlendsk umboð verið hjástødd á hátíðarhaldinum.



*Hamid Karzai var fyri drápsroynd í apríl*
*Mynd: Polfoto*

### Ísrael letur fangar leysar

Ísraelska stjórnin samtykti í gjár at lata 200 palestinskar fangar sleppa leysar úr ísraelskum fongslum. Millum fangarnar, sum sleppa leysir, eru tveir menn, sum vórðu tiknir og settir í fongsul fyri 30 árum síðani fyri at hava søkt at málum í Ísrael.

Talsmaðurin hjá Ehud Olmert, forsætisráðharra, sigur við ísraelsku fjølmiðlarnar, at stjórnin hevur gjørt av at lata fangarnar leysar fyri at vísa vælvild yvir fyri palestinska forsetanum Mahmoud Abbas.



*Ehud Olmert er ísraelskur forsætisráðharri*
*Mynd: Polfoto*